## DAGSINS MEINING

# Fokus á tóvirki og tekstillist

Í hesum árum hendir sera nógv og spennandi innan føroyska listaheimin. Innan bókmentir: stórar spennandi og øðrvísi skaldsøgur, hartil yrkingasøvn í hópatali. Innan tónleikin er stór menning á klassiska so væl sum á rútmiska økinum. Tjóðpallur er farin til verka og týdningurin av hesum fyri pallistina kann valla yvirmetast. Innan myndlistina hava Føroyar staðið sterkar í mong ár. Henda listagrein hevur verið eyðkend av oljumálningum og økið hevur verið dominerað av monnum. Tó so, at seinastu árini eru fleiri ungar listakvinnur komnar væl við. Myndlistaøkið hevur verið rakt av ósemjum millum listafólkini um leiðsluna av Listasavni Føroya. Henda ósemja er tó ikki verri enn so, at vit í fjør fingu fleiri framúrskarandi listaframsýningar eitt nú á Skipasmiðjuni, í Listasavninum og í tí frálíka Gallerí Fokus.

Nevndin, ið skal koma við tilmæli um Mentanarvirðislønlandsins hevur í 2005 sett fokus á ein sera áhugaverdan og spennandi part av myndlistini nevniliga tólistina, ið er ein partur av tekstillistini. Var tað ein djørv og røtt avgerð at lata Heiðursgávu landsins til Emil Juul Thomsen, so kann tað sama við røttum verða sagt um avgerðina at mæla mentamálaráðharranum til lata mentanarvirðislønina til Titu Vinther. Við hesi avgerð hevur tilmælisnevndin sett fokus á ein part av myndlisitni, sum vit ikki gáa so nógv um í føroyska gerandisdegnum. Og kortini er hetta tann listagreinin, sum kanska mest er í ætt við føroyska fólkamentan. Hetta er fyrstu ferð, Mentanarvirðisløn Landsins verður latin eini kvinnu, og øll eiga at fegnast um, at føroyskar listakvinnur nú skriva seg inn í hendan partin av okkara listasøgu, sum móttakarin Tita málbar seg her í blaðnum í gjár. Í grundgevingini fyri at lata Titu Vinter Mentanarvirðisløn Landsins, sigur Virðislønarnevndin millum annað: "Mentanarvirðisløn Landsins verður latin Titu Vinther fyri hennara slóðbrótandi arbeiði innan vevlist í Føroyum. Hóast hon ikki er uppvaksin í Føroyum, fær hon nógvan íblástur úr føroysku náttúruni, og er hon ein sonn undangongukvinna og serfrøðingur í plantuliting og at nýta tilfar úr føroysku náttúruni yvirhøvur. Eisini hevur hon torað at brúkt annað tilfar enn tað vanliga og siðbundna; bæði menniskjahár og hestahár eru komin undir hennara kønu hendur og eru tvinnað og spunnin inn í listaverkini. Listarverkið "Santa Pæturs nót", sum er vevað úr menniskjahárum, hevur fingið sera góð ummæli bæði her heima og í øðrum londum. Fleiri av verkum hennara eru at síggja í Listasavni Føroya. Tita hevur megnað at lyft vevingina upp á eitt hægri listarligt støði, frá handverki til list, og á tann hátt hevur hon slóðað veg og veitt íblástur til aðrar kvinnur innan hesa listargrein".

Hetta eru sanniliga beinrakin og vælvald orð, sum vit her kunnu taka fult út undir við. Avgerðin um at heiðra Titu Vinther fer at hava stóran týdning fyri tólistina. Hetta fer at seta fokus á hesa elligomlu føroysku listagrein og fer vónandi at geva teimum ungu, sum dyrka hetta økið nýtt mót og nýggja íblástur. Nevnd og landsstýrismaður hava sett fokus á eitt sera týdningarmikið og spennandi listaøki, sum higartil at kalla hevur livað í skugganum. Heiðurin er tí so at siga galdandi fyri alt økið og tað er bara gott um at siga. Vit ynskja Titu Vinther tilukku!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Nýskipanaruppskot Sambandsfloksins staðfest í ST

KAJ LEO JOHANNESEN
Sambandsflokkurin



**– Nýskipanaruppskot Sambandsfloksins sigur, at vit skulu staðfesta, at Føroyar eru ein sjálvstýrandi tjóð í ríkinum, sigur formaður Sambandsfloksins**

Sambandsflokkurin fegnast um yvirlýsingina frá donsku stjórnini til ST, sum staðfestir, at Føroyar eru í ríkisfelagsskapi við Danmark, og at tað er heimastýrislógin, sum er grundarlagið undir lógini um víðkaðar uttanríkispolitiskar heimildir. Eisini fegnast Sambandsflokkurin um, at tað stendur í Circular Note til ST, at uttanríkispolitiska heimildarlógin er gjørd sambært sjálvsavgerðarætti føroyinga sambært altjóða rætti.

**Hvat er staðfest?**
Løgmaður hevur rætt tá hann sigur, at fráboðanin staðfestir okkara sjálvsavgerðarætt sambært altjóðarætti. Men fráboðanin sigur tó einki um, at føroyingar til eina og hvørja tí avgerða okkara egnu ríkisrættarligu viðurskifti. Fráboðanin sigur bert, at tann sáttmálin sum er gjørdur millum Føroyar og Danmark er gjørdur sambært altjóða rætti.

Fyri Sambandsflokkin hevur tað ongantíð verði nakar trupuleiki, hvat onnur halda, siga og meina um okkum føroyingar, tá talan er um sjálvsavgerðarætt. Sambandsflokkurin hevur ta greiðu støðu, at føroyingar eru eitt fólk, ein tjóð, og at vit til eina og hvørja tíð avgera sjálv okkara framtíðarstøðu í ríkisfelagsskapinum.

**Heimastýrislógin er grundarlagið**
Bæði staðfestingin av at vit eru partur av danska ríkinum, og staðfestingin av lógini um uttanríkispolitiskar heimildir, byggja á heimastýrislógina. Tað er hetta, sum verður staðfest í yvirlýsingini til ST. Harumframt verður staðfest, at sjálvsavgerðarættur føroyinga sambært altjóðarætti er galdandi í mun til tær heimildir sum lógin um uttanríkispolitiskar heimildir gevur okkum.

Um danska stjórnin í staðin hevði sent ta føroysku lógina við teimum føroysku viðmerkingum til ST, so hevði tað ikki broytt støðuna viðvíkjandi okkara sokallaða "ómissandi framhaldandi sjálvsavgerðarætti sambært altjóðarætti".

**Fólkið ræður**
Tær grundgevingar sum vórðu nýttar í sambandi við, at ætlaða fólkaatkvøðan í 2000 varð avlýst, nevniliga møguleikin fyri, at vit fóru at lima okkum inn í danska ríkið í allar ævir, kunnu ikki vera galdandi longur, tí lógin um uttanríkispolitiskar heimildir, sum nú er fráboða ST, staðfestir við sjey tumma seymi, at vit eru í einum ríkisfelagsskapi, og at leisturin undir honum er heimastýrislógin.

Sambandsflokkurin staðfestir sostatt, at fráboðanin til ST er ein staðfesting av Nýskipanaruppskoti Sambandsfloksins, sum sigur, at vit eru ein sjálvstýrandi tjóð í ríkinum, at vit virka undir heimastýrislógini, og at vit verða verandi í ríkinum so leingi sum ein meiriluti av Føroya fólki ynskir at so skal vera. Hetta er fult í trá við ta fatan, sum Sambandsflokkurin hevur av viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark.

# Tvørballið

MARJUS DAM
Løgtingsmaður



**– Hvør kennir ikki tvørballið aftur? Sig við tvørballið, at veðrið er gott. Nei, sigur tvørballið, veðrið er ringt**

Sig við tvørballið, at blóman er vøkur. Nei sigur tvørballið, blóman er ljót.

Sig við tvørballið, at vit duga væl. Nei, sigur tvørballið, vit duga onki.

Sig við tvørballið, at vit ráða í Føroyum. Nei, sigur tvørballið, danir ráða í Føroyum.

Sig við tvørballið, at føroyingar hava sjálvsavgerðarrætt lýstan í ST. Nei, sigur tvørballið, danir hava sjálvsavgerðarrætt. Sjálvsavgerðarrætturin er eitt snisálop á eina fullveldistilgongd, sigur tvørballið (skil, hvør í skilja kann).

Mær tykir, at leiðari Tjóðveldisfloksins seinastu tíðina er heldur negativur, eins og eitt turt, súrt tvørball. Uppgávan hjá honum tykist vera at sáða mistreysti og undirlutakenslur í føroyingar.

Sjálvt um ikki alt er gott í hesum landi, so mugu vit standa saman fyri at royna at koma framá. Vit mugu halda fast í, at blóman er vøkur, at luftin er frísk, og at vit hava eitt gott land at búgva í. Eitt land, sum vit royna at gera okkara ítarsta fyri at gera enn betri. Um vit skulu koma framá, má skaðiligi hugburðurin hjá tvørballinum á vestfallið. Tí tá gerst blóman enn vakrari og luftin enn frískari.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.